## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:** Hvassur vindur ella skrið av útsynningi og ælingur, men um kvøldið nakað minni vindur og yvirhøvur turt. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið hósdagin:** Hvassur vindur ella skrið av landsynningi og regn. Seinnapartin nakað minni vindur av útsynningi og ælingur. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið fríggjadagin:** Skrið ella stormur av útsynningi og ælingur. Hitin millum 7 og 10 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:** Leygardagin lot av ymsum ættum og yvirhøvur turt, men sunnudagin veksur hann vindin upp í hvassan vind av eystri og regn. Hitin millum 6 og 10 stig.

# Frændur halda jól í Fuglafirði



**Frændur spælir til dans í Mentanarhúsinum í Fuglafirði leygarkvøldið 16. desember**

Teir verða ikki tiknir – Frændur. Hóast tað eru liðin meira enn 10 ár síðani seinastu útgávuna hjá teimum, er bólkurin framvegis best umtókti tónleikabólkurin í landinum.

Hetta sást millum annað til konsert í Runavík herfyri, har Frændur spældi saman við øðrum bólkum. Eini 1300 fólk vóru og lurtaðu, og tað var ikki minst Frændur, sum hevði lokkað tey mongu fólkini saman í ítróttarhøllini í Runavík.

Frændur spælir av og á til dans, og hesi tiltøkini eru nakað heilt serligt. Góðu, gomlu sangirnir, sum tey flestu munnu duga at syngja við til, fáa lív í fólki, og tað er trupult hjá øðrum føroyskum bólkum at rúnarbinda eina áhoyrarafjøld við so nógvum kendum sangum, sum Frændur kann.

Tað verður gjørligt at hoyra Frændur spæla einaferð í jólamánaðinum. Tað verður í Mentanarhúsinum í Fuglafirði leygarkvøldið 16. desember.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -8 |
| Nuuk | -5 |
| Qaqortoq | -3 |
| Ammassalik | -10 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | -2 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 10 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 9 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 9 |
| Keypmannah. | 10 |
| Helsinki | 7 |
| Moskva | 7 |
| Berlin | 12 |
| Warzawa | 12 |
| Kiev | 6 |
| Bukarest | 6 |
| Paris | 14 |
| Madrid | 9 |
| Róm | 18 |
| Malorca | 20 |
| Athen | -- |
| Malta | 20 |
| Tunis | 24 |
| Beijing | 4 |
| New Dehli | -- |
| Bangkok | 35 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | -- |
| New York | 13 |
| Miami | 23 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | 17 |
| Panama | 30 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 21 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 960 hPa. sunnan fyri Ísland stendur mestsum í stað og dýpist. Eitt annað lágtrýst, 1000 hPa. yvir Skotlandi fer norðureftir og dýpist somuleiðis.




**Í dag:**
Eitt lágtrýst, 982 hPa. í útsynning úr Írlandi fer í landnyrðing og dýpist nógv, Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum hósdagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 26/10 kl. 06⁰⁰– 27/11. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 5,1° Minsti hiti máldur í november: - 7,2° - Mesti hiti máldur í november: 12,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 17/10 kl. 06⁰⁰– 18/10 kl. 06⁰⁰ Avfallið higartil í oktober: 0,0 mm




Sosialurin




## VESTFALLSKYRRINDI

28. november Fyrra kvarter
2. desember Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 28. Nov. | - | 12.24 | 11.24 | - | 11.39 | - | 01.48 | 14.24 | 02.48 | 15.24 | 10.39 | 23.15 | 09.39 | 22.15 | 00.03 | 12.39 | 01.03 | 13.39 | - | 12.09 | 00.48 | 13.24 |
| 29. Nov. | 01.00 | 13.35 | 00.00 | 12.35 | 00.15 | 12.50 | 03.00 | 15.35 | 04.00 | 16.35 | 11.50 | - | 10.50 | 23.26 | 01.15 | 13.50 | 02.15 | 14.50 | 00.45 | 13.20 | 02.00 | 14.35 |
| 30. Nov. | 02.11 | 14.32 | 01.11 | 13.32 | 01.26 | 13.47 | 04.11 | 16.32 | 05.11 | 17.32 | 00.26 | 12.47 | 11.47 | 23.50 | 02.26 | 14.47 | 03.26 | 15.47 | 01.56 | 14.17 | 03.11 | 15.32 |
| 1. des | 02.54 | 15.17 | 01.54 | 14.17 | 02.09 | 14.32 | 04.54 | 17.17 | 05.54 | 18.17 | 01.09 | 13.32 | 00.09 | 12.32 | 03.09 | 15.32 | 04.09 | 16.32 | 02.39 | 15.02 | 03.54 | 16.17 |
| 2. Des | 03.40 | 16.04 | 02.40 | 15.04 | 02.55 | 15.19 | 05.40 | 18.04 | 06.40 | 19.04 | 01.55 | 14.19 | 00.55 | 13.19 | 03.55 | 16.19 | 04.55 | 17.19 | 03.25 | 15.49 | 04.40 | 17.04 |